## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seint um kvøldið regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og mánadagin yvirhøvur turt, týsdagin møguliga regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Velbastaðdiddur fyrsta túrin til Klaksvíkar

**Seinastu tvær vikurnar hava tvær gentur av Velbastað, sum ganga í 10. b í Kommunuskúlanum, verið í starvsvenjing á Sosialinum. Tær eita Anja Brekkstein og Sólrun Hansen**

STARVSVENJING
*Ingrid Bjarnastein*

Starvsvenjingartíðin er upp á tað hægsta, og um hesa tíðina eru fleiri skúlanæmingar í starvsvenjing.

Seinastu tvær vikurnar hava Anja Brekkstein, 16, og Sólrun Hansen, 17, verið í starsvenjing á Sosialinum. Tær búgva á Velbastað og ganga í 10. b í Kommunuskúlanum.

– Okkum hevur dámað væl á Sosialinum, siga tær báðar, Anja og Sólrun.

– Vit hava upplivað nógv, og verið nógvastaðni. Vit hava verið í rættinum, í trivnaðarmálaráðnum, úti við myndamanninum og nógv annað. Og mikudagin sluppu vit við út í Tinganes at hitta íslendska uttanríkisráðharran, Halldór Ásgrímsson saman við løgmanni. Tað var ógvuliga spennandi.

Umframt hetta, so vóru tær báðar Velbastaðdiddurnar eisini ein túr á lokalredaktiónini í Klaksvík. Hetta var eisini fyrsta ferðin tær vóru í Klaksvík.

– At vera í Klaksvík var bara stuttligt. Tá tú ikki hevur familju har, og ikki íðkar ítrótt, so fert tú ikki bara soleiðis uttan víðari til Klaksvíkar, siga tær báðar, sum tó eru fegnar um, at endiliga hava sæð Føroya næst største bý.

Báðar siga tær, at tær høvdu tímað at arbeitt sum journalistar. Aftaná 10. flokk ætla tær sær víðari í skúla. Helst student.

– Vit tíma ikki so væl at ganga í skúla beint nú, so tað var deiligt at sleppa út í starvsvenjing og gera okkurt annað, søgdu tær báðar at enda, áðrenn ein tann síðsta uppgávan stóð fyri durum: At fara út og gera samrøður við onkran annan, sum eisini er í starvsvenjing í hesum døgum.



*Teir báðir praktikantar, Anja Brekkstein og Sólrun Hansen, avmyndaðar saman við íslendska uttanríkisharranum, Halldór Ásgrímsson og løgmanni, Anfinn Kallsberg, úti í Tinganesi mikudagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 28 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 25 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1010 hPa sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist nakað.




Hátrýstið sunnan fyri Írland fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið yvir Íslandi fer eystureftir og hevur lýggja og slavna luft við sær á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/09 kl. 06$^{00}$– 26/09 kl. 06$^{00}$. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 25/09 kl. 06$^{00}$– 26/09 kl. 06$^{00}$
Avfallið higartil í september: 71,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fullmáni
23. sept.: Mánin longst frá jørðini
29. sept.: Seinna kvarter
6. okt.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. sept | 11.12 | 23.34 | 10.12 | 22.34 | 10.27 | 22.49 | 00.51 | 13.12 | 01.51 | 14.12 | 09.27 | 21.49 | 08.27 | 20.49 | 11.27 | 23.49 | 00.06 | 12.27 | 10.57 | 23.19 | — | 12.12 |
| 28. sept | 11.57 | — | 10.57 | 23.34 | 11.12 | 23.49 | 01.34 | 13.57 | 02.34 | 14.57 | 10.12 | 22.49 | 09.12 | 21.49 | — | 12.12 | 00.49 | 13.12 | 11.42 | — | 00.34 | 12.57 |
| 29. sept | 00.34 | 13.12 | — | 12.12 | — | 12.27 | 02.34 | 15.12 | 03.34 | 16.12 | 11.27 | — | 10.27 | 23.04 | 00.49 | 13.27 | 01.49 | 14.27 | 00.19 | 12.57 | 01.34 | 14.12 |
| 30. sept | 01.49 | 14.29 | 00.49 | 13.29 | 01.04 | 13.44 | 03.49 | 16.29 | 04.49 | 17.29 | 00.04 | 12.44 | 11.44 | — | 02.04 | 14.44 | 03.04 | 15.44 | 01.34 | 14.14 | 02.49 | 15.29 |

5 707265 100050 >